Fylgiskjal 2

**Gunnbjørg Danielsen**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Niels Winther <niels@industry.fo> |
| **Sendt:** | 3. juli 2017 23:22 |
| **Til:** | VMR-Journal; Herálvur Joensen; Sørin P. Sørensen; Pól Edvard Egholm |
| **Cc:** | Atli Gregersen; Regin Jacobsen (reja@bakkafrost.com) |
| **Emne:** | Ummæli av uppskoti um broytingar í alilógini |
| **Vedhæftede filer:** | Ummæli alilógin - Bakkafrost Hiddenfjord.pdf |

Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið.

Vegna P/F Bakkafrost og P/F Luna (Hiddenfjord) verður sent felags ummæli av uppskoti til ll. um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m. (viðheft)

Vinaliga kvitta fyri móttøku.

**Vinarliga /Kind Regards**

Niels Winther, ráðgevi /adviser

---

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Vinnuhúsið**
+298 309900 · Fax: +298 309901
Direct/Mobile: +298 739906
niels@industry.fo - www.industry.fo

**2. juli 2017**

## Ummæli av uppskoti um broytingar í alilógini

Alifeløgini P/F Bakkafrost og P/F Luna (Hiddenfjord) takka fyri møguleikan at ummæla uppskot til Ll. um broyting í Ll. um aling av fiski v.m., sum er sent til ummælis. Feløgini hava valt at gera hetta felags ummæli av týðandi partar av lógaruppskotinum. Feløgini hava hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

### Alment um uppskotið

Týdningurin av lógarkarmunum, sum regulera alingina kunnu ikki yvirmetast. Vit hava í verki sæð royndirnar við aling undir vánaligum lógarkarmum og undir góðum lógarkarmum. Úrslitið hevur verið sum dagur og nátt. Alilógin kann sigast at vera grundlógin fyri føroyska aling, og tí skulu góðar grundgevingar vera fyri at broyta ein vælvirkandi lógarkarm, og um broytingar eru neyðugar, skulu hesar vera sera væl umhugsaðar.

Í lógaruppskotinum, sum er sent til hoyringar, eru nakrar týðandi broytingar av meginreglunum í okkara aliskipan, sum í ringasta føri kunnu vera til stóran skaða fyri føroyska alivinnu. Hugsað verður her serliga um at fara frá grundregluni um "Ein alari – ein fjørður", og um tær broytingar, sum kunnu sáa iva um tryggleikan í aliloyvisskipanini. Hetta verður nærri viðmerkt undir viðmerkingunum til einstøku broytingarnar niðanfyri.

Harumframt benda nakrar av uppskotnu broytingunum á, at politisk stýring av framleiðsluni fær ein størri leiklut. Hetta slagið av vinnupolitikki hoyrir einari farnari tíð til. Í flestu framkomnum londum verður arbeitt út frá tí prinsippi, at endamálið við vinnupolitikkinum er at skapa so stórt virði sum gjørligt, og at vinnupolitikkur og fordeilingspolitikkur eiga at verða hildin hvør sær. Hetta eigur eisini at vera støðan í einum framkomnum landi sum Føroyum. Fyrsta fortreytin fyri, at nakað er at fordeila, er at virðini yvirhøvur verða skapt av fyrstan tíð, og hetta eigur at verða høvuðsfokus í førda alipolitikkinum her á landi.

### Viðmerkingar til einstøku broytingarnar

#### § 1, nr. 1 og nr. 4 Burðardyggir karmar

Viðmerkingarnar siga, at tað skal nágreinast, hvat liggur í orðingini "at skapa karmar fyri burðardyggari menning av alivinnuni".

Í hesum sambandi verður sagt, at atlit til umhvørvi í víðum týdningi verða regulerað eftir serligari lóggávu, herundir djórasjúkulógini og umhvørvisverndarlógini.

Samsvarandi hesum eru tað hesir myndugleikar, sum taka avgerðir, sum innihalda meting av atlitinum til umhvørvi, herundir til djórasjúkur.

Í uppskotnu broytingini av § 6, stk. 2, verður ætlandi sett í lógina, at djórasjúku- og umhvørvisatlit eisini kunnu verða tikin eftir alilógini av myndugleikanum eftir eini samlaðari meting.

Tað tykist, sum ætlanin er at innføra eina dupulta heimild at regulera umhvørvislig viðurskifti, og at landsstýrismaðurin skal hava ein sjálvstøðugan myndugleika at taka umhvørvisatlit við í síni meting, umframt tær metingar, sum Umhvørvisstovan og Heilsufrøðiliga Starvsstovan longu taka í dag.

Slík samanblanding av myndugleikaøkjum kunnu feløgini ikki uttan víðari taka undir við. Leggjast kann afturat, at tað ikki greitt framgongur av viðmerkingunum, hvørjir ítøkiligu trupulleikarnir eru við verandi ásetingum, har tað sum høvuðsreglu eru ávíkavist Umhvørvisstovan og Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum umsita hvør sítt serøki. Einki verður skrivað um, hví alimyndugleikin ynskir at hava sjálvstøðuga heimild á hesum øki.

Tað er ein heilt vanlig regla, at tað er spesialmyndugleikin, sum umsitur spesialøki, og at tveir myndugleikar ikki eiga at hava sama málsøki at umsita, og at tað altíð er vandi á ferð, tá ein dupultheimild fyriliggur.

Um fleiri myndugleikar skulu umsita økið viðvíkjandi umhvørvi og heilsufrøðiligum ásetingum, herundir reglur um sjúkuniðurberjan v.m., so vil hetta heilt grundleggjandi gera inntriv í tann struktur, sum í aðrar mátar er galdandi innan føroyska lóggávu.

Samanumtikið verður tí mælt frá at fremja hesa broyting.

**§ 1, nr. 2 Loyvisviðurskifti**

Í lógaruppskotinum verður skotið upp at áseta í lógini, at rættindi sbrt. alilógini eru grundað á loyvi frá tí almenna, eru tíðaravmarkað, og kunnu sigast upp.

Í viðmerkingunum verður nógv gjørt burtur úr at nágreina, at eitt aliloyvi ikki gevur ognarrætt, og at endamálið við nýggju ásetingini er yvirskipað at staðfesta hetta.

Feløgini halda onga orsøk vera at gera slíka áseting og viðmerkingar, tí føroyska alivinnan hevur ongantíð gjørt galdandi, at eitt aliloyvi gevur ein ognarrætt. Eitt aliloyvi er sambært galdandi lóg ein nýtslurættur, sum verður latin alifeløgunum. Ein nýtslurættur, sum tó er vardur av ásetingunum í grundlógini.

Sjálvsagt skal alivinnan laga seg eftir teirri lóggávu sum er galdandi, og vinnan er sjálvsagt ikki vard móti sakligum lógarbroytingum. Alivinnan viðurkennir eisini, at tann nýtslurættur, sum er fingin við einum aliloyvi, kann sigast upp. Tó kann hesin nýtslurættur bert uppsigast við eini hóskandi freist og ein møgulig uppsøgn kann bert vera grundað á saklig viðurskifti. Ein uppsagnarfreist uppá 12 ár er ov stutt, longu av teirri orsøk, at føroyska alivinnan krevur stórar íløgur, og tað ber ikki til at avskriva hesar íløgur eftir 12 árum. Sum eitt dømi kann nevnast tær stóru íløgurnar í smoltstøðir á landi, sum alifeløgini gera fyri at kunna vaksa um framleiðsluna á burðardyggan hátt. Ein týðandi fortreyt fyri at gera slíkar íløgur, er tíðarhorisonturin í aliloyvinum.

Føroya Havbúnaðarfelag bað fyri nøkrum árum síðani um eina løgfrøðiliga meting av hesum spurningi. Niðurstøðan var, at yvirskipað er nógv sum talar fyri, at uppsagnarfreistin ikki kann vera styttri enn verandi restloyvistíðarskeið + 12 ár.

Í almennu viðmerkingunum verður skrivað, at endamálið við ásetingini ikki er at broyta tey rættindi, sum fylgja av § 5 í galdandi lóg.

Sum kunnugt elvir kravið um lógliga og sakliga fyrisiting til, at ein myndugleiki á sakligan og lógligan hátt skal kunna grundgeva fyri einum noktandi svari uppá at fáa eitt aliloyvi longt. Sambært § 5 í galdandi lóg er trupult at síggja hvussu myndugleikin tá loyvistíðarskeiðið er runnið við nakrari heimild í lógini sakliga kann nokta fyri eina leinging av aliloyvinum, uttan so, at ein leinging er í stríð við ásetingarnar í § 5, stk. 4.

Verandi lóg inniheldur í § 8 ásetingar um, at eitt loyvi kann broytast ella takast aftur, um loyvishavarin misheldur sínar skyldur ella onnur viðurskifti fevnd av § 8 gera seg galdandi. Sum kunnugt skulu eisini mál um møguliga broyting í ella afturtøku av einum loyvi fyrisitast á lógligan og sakligan hátt.

Um ætlanin er at innføra eina generella reglu sum førir við sær, at landsstyrismaðurin eftir eini meting kann uppsiga eitt loyvi ella taka aftur eitt verandi loyvi í úrtíð, eisini í førum har loyvishavarin ikki misheldur sínar skyldur, kann føroyska alivinnan ikki liva við hesum. Neyðugt er, at tað verður gjørt greitt í lógaruppskotinum hvør ætlanin er í so máta. Spjaddu viðmerkingarnar í lógaruppskotinum um rættindini hjá landsstýrismanninum at taka loyvi aftur v.m. eru eftir okkara meting bert við til at fløkja støðuna, og eiga ikki at vera tiknar við í uppskotið yvirhøvur.

Samanumtikið verður tí mælt til at strika hesa áseting. Tað er okkara fatan, at fyriliggjandi uppskot sum heild vil gera støðuna hjá føroysku alivinnuna ótryggari enn hon er í dag. Allir aktørar í alivinnuni, tað eru íleggjarar, lánsveitarar og feløg hava innrættað seg eftir verandi skipan, sum er ein loyvisskipan uppá 12 ár við rætti til leingjan av verandi loyvi, um fortreytirnar fyri hesum eru til staðar sambært lógini.

Vit skilja heldur ikki tørvin á hesi reglu, ikki minst tá sagt verður undir serligu viðmerkingunum (síða 23), at endamálið við ásetingini í uppskotinum ikki er at broyta tey rættindi, sum fylgja av § 5 í galdandi lóg.

Um ætlanin er at broyta skipanina eigur hetta at verða greitt tilskilað í lógaruppskotinum og eigur slík broyting í minsta lagi at verða gjørd við eini freist, sum ikki kann vera stytri enn verandi resloyvistíðarskeið + 12 ár.

Samanumtikið duga feløginia ikki at síggja endamálið við hesari broytingini, og mæla til at strika hana.

**§ 1, nr. 3 Virkísøki**

Ongar viðmerkingar til broytingina.

**§ 1, nr. 5 Útluting av aliloyvum**

Sambært uppskotinum verður lagt upp til, at landsstýrismaðurin skal hava heimild at útluta nýggj aliloyvi eftir eini uppboðssøluskipan.

Í almennu viðmerkingunum verður skrivað, at nýtt aliloyvi merkir eitt laksaaliloyvi á sjóøkinum, sum er tøkt hjá myndugleikunum at luta út.

Í hesum sambandi meta vit tað vera av stórum týdningi, at tað verður presiserað í hesum partinum av uppskotinum, at talan bert eru um loyvi, sum eru leys at søkja, og at loyvi, sum skulu endurnýggjast eftir at verandi loyvistíðarskeið er úti (sambært § 5), ikki eru nýggj og tøk.

Annars er tað okkara áskoðan, at ein uppboðssøluskipan ikki á nakran hátt vil vera til frama fyri føroysku alivinnuna ella føroyska samfelagið. Í staðin eiga nýggj aliloyvi at verða útlutaði til tann umsøkjara, sum aliumsitingin út frá einari heildarmeting metir verða best kvalifiseraðan at reka alivinnu á staðnum.

**§ 1, nr. 6 (§ 6a) Alifirðir**

Umsitingarreglan "ein alifjørður – ein alari" hevur verið ein av grundarsteinunum undir føroyska alipolitikkinum seinastu árini. Allur framburður og vøkstur innan føroysku alivinnuna seinastu árini hevur verið grundaður á hesa umsitingarreglu. Skotið verður nú upp at útvatna hesa meginreglu, so hon framyvir bara er galdandi fyri laksaaling, meðan latið verður upp fyri aðrari aling á firðum, har laksaaling er frammanundan. Eitt nú aling á landi og aling av tara og skeljadjórum.

At fleiri loyvishavarar koma inn á ein alifjørð, er sum nevnt brot á eitt av teimum grundprinsippum, sum eru týðandi grundarlag undir tí burðardygga vøkstri, sum hevur verið í føroyskari alivinnu seinastu árini. Hetta er vandaleið á ganga, og einki verður upplýst um, hvørt nøkur váðagreining er gjørd av einari so umfatandi broyting av fyrisitingarligari praksis. Vísast kann á, at hesir nýggju loyvishavarar generelt ikki hava sama sterka áhuga í laksasjúkufyribyrging, sum verandi laksaalarar hava, longu tí at teir ikki sjálvir verða ávirkaðir av teimum trupulleikum við sjúku o.a., sum laksaalarar hava so stóran áhuga í at fyribyrgja.

Tað má undirstrikast, at tað var orsakað av dýrt keyptum royndum at man setti í verk umsitingarmeginregluna um "ein alifjørður – ein alari". Hesar royndir hava haft við sær, at aðalendamálið við alipolitikkinum seinastu árini hevur verið sjúkufyribyrging, og at alivinnan kann vaksa á burðardyggum grundarlagi.

Undir hesum atlitum hevur meginreglan "ein alari – ein fjørur" ligið til grund fyri øllum broytingum, sum hava verið gjørdar higartil í rakstrarkunngerðini. Tað er okkara áskoðan, at nýggju ásetingarnar um at sleppa hesari meginreglu kunnu verða til óbótaligan skaða fyri alivinnuna.

Sjálvsagt kann tað eftir eina ítøkiliga meting vísa seg at vera praktiskt møguligt at hava annað virksemi á firðum og sundum, men hetta eigur ikki at hava sum avleiðing, at verandi meginreglur verða broyttar.

Allur framíhjárættur og ívi eigur at koma verandi loyvishavara á einum alifjørði tilgóðar, harundir soleiðis, at tað ikki eigur at verða loyvt øðrum at ala matfisk á landi við ein alifjørð uttan so, at verandi loyvishavari á alifjørðinum loyvir hesum.

Heldur ikki eigur onnur aling, so sum t.d. aling av skeljum og tara, at verða loyvd uttan so, at slíkt virksemi ikki hevur heilsuligar ella umhvørvisligar vansar við sær fyri verandi aling av matfiski á alifjørðinum. Harumframt eigur onnur aling bert at verða loyvd við tí staðiligu treyt, at slíkt loyvi uttan víðari verður tikið aftur, um tað vísur seg, at alingin hevur heilsuligar ella umhvørvisligar vansar við sær fyri aling av matfiski á alifjørðinum.

Samanumtikið verður mælt staðiliga frá, at verandi meginregla um "ein alifjørður – ein alari" verður broytt. Heldur eigur núgaldandi regla at verða lógarfest.

**§ 1, nr. 6 (§ 6b) Aling á vøtnum**

Feløgini hava ongar viðmerkingar til uppskotnu lógarásetingina.

Sambært serligu viðmerkingunum er ætlanin at skriva út aliloyvi á landi í Vestmanna og í Norðadali. Vísandi til viðmerkingarnar omanfyri undir "§ 1, nr. 6 (§ 6a) Alifirðir" eigur ikki at verða loyvt øðrum at ala matfisk á landi við ein alifjørð uttan so, at verandi loyvishavari á alifjørðinum loyvir hesum.

Vísandi hertil verður mælt til, at umrøðan av ætlanini at skriva út aliloyvi á landi í Vestmanna og í Norðadali antin verður tikin úr viðmerkingunum ella at tilskilað verður, at ætlanin er treytað av, at verandi loyvishavari á viðkomandi alifjørði loyvir hesum.

**§ 1, nr. 6 (§ 6c) Krav um virking í Suðuroy**

Lógaruppskotið leggur upp til, at laksur frá alibrúkum og alifirðum í Suðuroy skal verða virkaður á virkjum í Suðuroy. Við virking skilst bløðging, kryvjing, pakking av heilum fiski, ísaður ella frystur. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, herundir reglur um afturtøku av loyvi, um hesar treytir ikki verða hildnar.

Talan er um eitt sera stórt og eitt heilt óvanligt inntriv í verandi virksemi. Ein slík áseting ber boð um ein vinnupolitiska hugsan frá farnum tíðum, við politiskari stýring av hvar og hvussu framleiðslan skal vera skipað fyri at skapa arbeiðspláss. Feløgini undirmeta ikki á nakran hátt teir trupulleikar, sum Suðuroyggin hevur í mun til restina av landinum, men at fara at lóggeva framleiðsluforðingar inn í eina vinnu, sum er í harðari altjóða kapping, er ikki til gagns fyri hvørki føroyska samfelagið ella Suðuroynna. Um framleiðsla skal vera í Suðuroy, so skal tað vera tí tað loysir seg búskaparliga.

Vandi kann eisini vera fyri, at onnur øki í landinum, sum hava avbjóðingar, fara at seta fram líknandi krøv, og tá er ringt at ímynda sær, hvat tað kann enda við.

Talan er um eitt stórt inntriv mótvegis einum verandi loyvishavara, sum hevur innrættað sítt virksemi út frá ávísum fortreytum. Slíkar skerjingar í møguleikunum at leggja framleiðsluna til rættis eiga ikki at verða framdar á henda hátt. Í hvussu so er eigur vinnan at fáa eina nøktandi freist at tillaga seg broyttu treytunum hesum viðvíkjandi.

Samanumtikið verður mælt frá at áseta krøv um virking í Suðuroy. Politiska skipanin hevur nógv amboð, sum kunnu nýtast til at menna Suðuroynna. Hetta er ikki eitt av teimum.

**§ 1, nr. 6 (§ 6d) Felagaformur**

Ongar viðmerkingar eru til hesa áseting.

**§ 1, nr. 7-8 Eigaramark**

Lógaruppskotið leggur upp til, at bert vinnulig loyvi skulu teljast við, tá eigaramarkið á 50% skal ásetast, og at samlaða talið av aliloyvum, sum telja við í eigaramarkinum fer úr 25 aliloyvum niður í 22 aliloyvi. Henda áseting verður ikki regulerað afturvirkandi, men hevur eitt felag aliloyvi, sum er omanfyri markið, kann felagið ikki fáa nýggj aliloyvi fyrr enn felagið aftur er undir markinum.

Til spurningin um eigaramarkið hava feløgini ta støðu, at tað er skilagóður vinnupolitikkur at taka útgangsstøði í talinum á aliloyvum. Í aðrar mátar verður víst til hoyringsskrivini frá einstøku alifeløgunum.

**§ 1, nr. 9-11 Útlendskur kapitalur**

Víst verður til viðmerkingarnar frá einstøku alifeløgunum.

**§ 1, nr. 12-13 Ymiskar ásetingar**

Ongar viðmerkingar eru til hesar broytingarnar.

Vegna P/F Bakkafrost

Regin Jacobsen, stjóri

Vegna P/F Luna

Atli Gregersen, stjóri